

William Smith

# Sæl eru tey rættvísu

Eingin ivi um, at landsstýriskvinnan í innanríkismálum meinar tað væl, nú hon mælir til at eisini brekað eiga at verða umfatað av grein 266 b í revsilógini. Men landsstýriskvinnan hevði kanska ikki roknað við, at Miðflokkurin fór at nýta høvi til at brúka hennara sømuliga tilmæli til aftur at sleppa at válka sær í sínum ókristuliga, fundamentalistiska einkarandstygd móti samkyndum. Ikki var annað at vænta, kortini. Teir, ið umboða Miðflokkin á tingi, nýta eitt og hvørt høvi til at blása í dómadagsbasúnur um, hvør ið er (persónliga) frelstur og hvør ið er glataður her á fold. Við teirri forskrúvaðu menniskjafatan, teir umboða, verða teir neyvan nøgdir fyrrenn okkara samfelag verður skipað eftir talibanskum hugsjónum og stýrt av einum diktatoriskum ayatollah.

Men onkusvegna er so markleyst sjálvsøkni hugtakandi. Er tað ikki eitt vælsignilsi at vera so ómetaliga rættvísur og reinur í huga og gerðum sum Miðflokkaumboðini eru? At hava sæð ljósið og sannleikan, soleiðis sum hann verður breiddur út av mannvándum, mannahatskum svávulprædikantum í tí blasfemiska bíbliubeltinum í landsynningspartinum av USA?

Gud náði okkum ófrelstu. Gud náði okkum, ið ikki kenna sannleikan. Gud náði okkum, sum í okkara vónleysa óhógvi trúgva, at kristni boðskapurin er um næstakærleika og toleransu. Hann náði okkum sum í okkara ókristuligu vankunn halda, at pláss eisini skal vera fyri samkyndum og teimum likamliga og religiøst brekaðu.

»Sæl eru tit, tá ið menniskjuni hata tykkum, tá ið tey ikki vilja vita av tykkum, og tá ið tey háða tykkum og kasta navn tykkara frá sær sum nakað ilt, fyri Menniskjasonarins skuld«.

(Luk. 6.22).

Umframt at vera evangelistur var Lukas eisini lækni.



Henrik Old

# Skjóta spurvar við kanón

Nú landstýrismaðurin í fiskivinnumálum skal áseta fiskidagar fyri komandi fiskiár, er tað ein bólkur sum verður mettur at vera serliga vandamikil fyri fiskastovnin. Landsstýrismaðurin biður løgtingið minka fiskidagatalið hjá smábátum við 5000 døgum, meðan restin av flotanum skal fáa fleiri fiskidagar gjøgnum eina nýggja brúksskyldu. Landsstýrismaðurin hevur neyvt fylgt tilmælinum frá tí eina liminum í fiskidaganevndini, hann sum umboðar stállínuskipini, sum skjýtur upp, at bólkur 5B missur 5000 dagar. Akkurat somu boðini komu frá Reiðarafelagnum. Nú havi eg sjálvur ein bát í bólki 5B, so sjálvandi kann man altíð verða mistonktur fyri at »hippa sína egnu veltu«. Men tað eru aðrar orsøkir til hesar reglur. Havi sjálvur verið við til at áseta fiskidagar oftari enn flest aðrir, og undrist tí yvir, at einans smábátar nú knappliga skulu vera vandamiklari enn allur hin flotin tilsamans, í og við at ongin annar fær nakran niðurskurð, tvørturímóti. Hvørjir eru so hesir »vandafullu« útróðrarmenn? Rætt er, at tað er ein blandað forsamling, sum tað altíð hevur verið. Serliga í teimum vanligu útróðrarbygdunum í Føroyum.

Størsti bólkurin er helst fiski- og útróðrarmenn, sum eru farnir um tey 67 árini, og tí ikki kunnu verða í bólki 5A, orsakað av at teir fáa fólkapensión og samhaldsfasta, og sostatt fáa pensión sum samlað fer upp um kr. 52.000, sum er inntøkumarkið millum bólk A og B.

Ein annar partur sum er í B skipanini eru útróðrarmenn, sum rógva út í teimum plássum har mest verður róð út um summarið orsaka av lendingarviðurskiftinum. Fleiri av teimum útróðrarmonnunum hava róð út alt sítt lív. Tað er greitt, at ein so ógvusligur niðurskurður sum 5000 dagar vil føra til, at dagarnir verða uppi móti sumri, um veðrið í várróðrinum er nøkulunda.

Havi hugt eftir, hvussu støðan verður í teimum bygdum, eg kenni mest til, um fiskidagarnir verða uppi, sum teir sjálvandi verða, um uppskotið frá línubátafelagnum og reiðarafelagnum verður samtykt. Tað verða bygdur har ongin bátur sleppur út, aðrar staðni kann ein bátur av 8- 10 halda fram eftir at dagarnir í 5 B eru brúktir. Hevur landsstýrismaðurin hugsað um, hvør keypir ein útróðrarbát frá einum, sum er noyddur at selja, tí hann fyllir 67 ár? Er man so neyðtrongdur at avmarka nakrar smábátar, so má tað kunna gerast uttan at kappa høvdið av øllum. Eisini má hugsast um, at hesir bátar fyri ein stóran part halda lív í uppboðssølinum úti um landið.

Eg var nakrar dagar á norðhavinum í vár og avreiddi nakrar sentnarar á Eiði. Tað sum undraði meg mest var, at við undantaki av einum 3- 4 útróðrarmonnum, vóru allir hinir báðumegin tey 70 árini.

Hvussu vandafullir hesir eru fyri fiskastovnin kann síggjast á yvirlitinum fyri avreiðingar fyri 2009. Bólkur 5 B avreiddi 1722 tons alt árið 2009. Av teimum vóru 1035 tons toskur. Línubátarnir avreiddu samanlagt 10.000 tons í 2009, av tí var 2600 tons toskur, umframt íslandskvotuna. Munurin var bara tann, at bólkur 5B, teir 70 ára gomlu, onga krónu fingu í stuðli úr landkassanum, meðan hin parturin hevði brúk fyri góðum 20 milliónum í stuðli fyri at fiska síni 10.000 tons.

Seinastu árini eru bæði partrolara- og lemmatrolaraflotin minkaður niður í helvt, meðan talið av línubátum er økt munandi, samtíðis sum intøkan hjá manningini er lækkað tilsvarandi. Tað síðsta nýggja er, at Reiðarafelagið vil hava ALS-skipanina broytta, so at menn kunnu tvingast umborð á skip sum annars ikki fáa fólk. Eydnast hetta, samtíðis sum høvdið verður kappað av einum parti av teimum smærri útrórðrabátunum, hvat verður so næsta kravið?

**P. s.:** Allir húkabátar, sum hava loyvi at avreiða, hava loyvi at fiska makrel, men kortini krevur Fiskimálastýrið 500 kr frá hvørjum báti, sum framman undan hava loyvi at fiska, og sum eg havi skilt hava yvir 30 hoppað upp á hetta.

Birgit Clementsen

# Grindadráp føroysk list?

Eg skilji ikki, at føroyamenn hvørt ár blíva við at leypa út í eitt so barbariskt og skemdarligt blóðbað og geva okkum tað æviga stemplið sum holubúgvar.

Eitt er vist, og tað er, at tað er ikki hungur, ið drívur teir. Skrellispannirnar eru fullar av matavlopi hvønn dag. Enntá hava vit fingið boð um at lata verða við at eta grind, tí tað er heilsuskaðiligt. Tað verður so ikki lurtað, sær tað út til.

Nei, man tað ikki bert verða gjørt til eina list? Sikken ein list. Eg spyrji bara, hvar eru følilsini, eru tey ísakøld? Sikkurt nokk, tá tað snýr seg um djór. Grindin er, sum vit vita, av delfinfamiljuni, hon hevur heitt blóð og pínist á sama hátt sum vit menniskju. Hon skríggjar og rópar neyðarróp, sjálvt um vit ikki hoyra tað. Hon er eitt súgdjór og føðir sínar ungar sum vit kvinnumenniskju.

Og tá blóðbaðið er av, verður allur sjógvurin í bygdini blóðreyður so langt eygað sær – sjálvt himmalin verður reyður, og lukturin røkkur langt út um bygdirnar. Hetta varðar alt í minst tríggjar dagar, áðrenn alt verður sum vanligt aftur. Hetta hevur als ongantíð verið ein tradition. Hetta bleiv gjørt av neyð fyrr í tíðini. Og hví hevur tað hildið fram síðani tá? Tað hevur so eingin neyð verið. At vit ikki skammast, tí hetta er óneyðugt.

Eg vóni, at unga ættarliðið tekur seg saman og steðgar hesi skammuligu listini og sigur »renn meg í grindatraditiónina«.

Djóraaktivisturin í Klaksvík varð kallaður fyri terrorist – okay, er tað prísurin fyri at verja djórini, so lat meg eisini vera terrorist. Hetta er annars eitt orð, sum hóskar betur til tey, sum eru aktiv í grindadrápinum.

Jørgen Niclasen, sum er politikari, biður føroyingar einki leggja í tað, sum stendur á teldum og í bløðum. Haldið bara fram við at drepa grind, sigur hann. Tað virkar mær bert sum ein tápulig útsøgn.